# Einaráðandi kvinnurnar - Einaráðandi kvinnurnar - Einaráðandi kvinnurnar - Einaráðandi kvinnurnar - Einaráðandi kvinnurnar –

*Tá tikið verður saman um kappingarárið, 2000/01, er einki at ivast í, hvat lið fer at fáa mestu umrøðuna. Kvinnurnar úr Vestmanna hava snøgt sagt sitið á øllum hetta kappingarárið. Í landskappingini varð talan bert um ein kostnaðarleysan javnleik í grundspælinum, meðan eingin hevur staðið teimum kurl síðani hetta*

*Heldur ikki í steypakappingini fekk nakað annað lið skelkað tær á nakran hátt, og tí fer tosið um hetta kappingarárið fyrst og fremst at snúgva seg um einaráðandi kvinnurnar úr Vestmanna. Á hesum síðum hava valt at røða stutt um tær, sum vóru við til at tryggja VÍF gullmerkini.*



**Sóleyð Nikkelsen, 133 mál**

Kom í ár til Vestmanna at spæla, armbindið er sjónligasta tekin um tað álit, sum felagið hevur sýnt henni í ár. Hon hevur so eisini í allar mátar livað upp til hetta álitið, og við framúrskarandi spæli gjøgnum megin partin av kappingarárinum, er hon ein av heitastu biðlunum til heitið sum ársins leikari.



**Fríða Marjunardóttir, 106 mál**

Hóast lítil í vavi, so hevur Fríða støðugt megnað at útfylt sín leiklut á VIF liðnum hetta kappingarárið. Við skjótleika sínum hevur hon verið ein týdningarmikil liður í kontraspælinum hjá VÍF, eins og hon fleiri ferðir hevur givið lyftir um eina bjarta framtíð sum spælskipari hjá VÍF.



**Nicolina Eyðbjørnsdóttir, 107 mál**

Frá at vera ein evnarík genta, hevur Nikolina í ár ment seg til ein av fremstu føroysku hondbóltsleikarunum. Eins og Fríða er hon týdningarmikil í kontraspælinum hjá VÍF, men ikki minst er tað tó í verjupartinum, at tey í Vestmanna hava fingið gleði av hennara skjót- og treiskleika.



**Alis Høghamar, 19 mál**

Hevur í stóran mun kappast við Randi um plássið á strikuni, og einki er at ivast í, at hetta er komið teimum báðum til góðar. Kropsliga styrkin ger hana til ein sera týðandi part í verjuspælinum, tí hon flytir seg snøgt sagt ikki fyri nøkrum. Hetta treiskni kemur henni somuleiðis til góðar í álopspartinum, har lutur hennara tó ikki hevur verið eins sjónligur.



**Angelina Jógvansdóttir, 7 mál**

Upprunaliga var tað ikki ætlanin, at Angelina skuldi eiga so stóran lut í kappingarárinum, tí arbeiðstíðir hennara riggaðu ikki so væl til hondbóltin. Skaðin hjá Nicoletu gjørdi tó, at tørvur var á hennara evnum, og uttan stórvegin hóvasták megnaði hon at gera sítt til at halda fast um sigursrøðina. Varð serliga nógv nýtt í verjupartinum, men eisini í álopspartinum hevur hon gjørt okkurt glepsið gjøgnum árið.



**Manuela Stan, 5 mál**

Við spælinum, sum VÍF hevur spælt í ár, er Manuela helst vorðin til týdningarmesti leikarin á liðnum. Millimetur neyvu útkøstini hava verið hornasteinurin í so at siga øllum kontraspælinum, og har umframt hava frálíku málmansevni hennara so avgjørt gjørt sítt, tá tættir dystir skuldu vinnast. At hon heldur ikki er sør longur úti á vøllinum prógvaði hon eisini í seinasta dystinum.



**Randi Kúrberg, 24 mál**

Hóast hon er úr Havn, so er hetta nú triðja árið, at Randi roynir seg í gula búnanum. Fremstu vørumerki hennara eru treiskleikin og kontanta verjuspælið, har hon altíð fer stríðsfúsin til verka. Hevur tó eisini ment seg nógv í álopspartinum, har hon er týdningarmkil liður í arbeiðinum at skapa rúmd fyri viðleikarum.



**Ioana Rápa, 192 mál**

Stóri rumening er í ár toppskjútti í føroysku kappingini triðja árið á rað. Hetta sigur tað mesta um týdning hennara í álopsspælinum, men tað er tó ikki minst í verjuspælinum, at styrki hennara liggur. Eins og Sóleyð eigur Ioana púra náttúrligt at teljast milum heitastu biðlarnar til stóra heiðurin sum ársins leikari.



**Nicoleta Radu, 65 mál**

Eftir eina heldur laka byrjan upp á árið menti Nicoleta seg til at gerast ein av mest týðandi leikarunum á VÍF liðnum. Tað var tí dyggur smeitur, tá hon breyt beinið í dysti móti Neistanum, men av síðulinjuni kundi hon so fegnast um avrikini hjá viðleikarunum. Styrkir hennara liggja serliga í verju- og kontraspælinum.



**Jacklin Durhuus, 51 mál**

Var niðri í Slagelse stóran part av grundspælinum, men gjørdist alt fyri eitt ein týðandi lutur á liðnum, tá hon vendi heim aftur um jóltíðir. Hóast hon sjáldan átti fast pláss á liðnum, so hevði hon í nógvum dystum avgerandi leiklutir, tá hon kom inn av beinkinum fyri at avlasta hinar bakspælararnar. Ikki minst var hetta sjónligt í steypafinaluni, har hon upp á 30 minuttir gjørdist stóri leikarin hjá VÍF í dystinum.



**Hallfríð Isaksen, 0 mál**

Hóast hon partvíst stóð í skugganum av Manuelu, so hevur tað í ár verið sjón fyri søgn, at Hallfríð hevur ment seg sera nógv sum málverja. Hevur á sín egna stillisliga hátt verið ein týdningarmikil partur av liðnum, tá hon í at kalla øllum dystum hevur megnað at avlastað Manuelu. Í einstøkum dystum hevur hetta eisini verið gjørt við eini avgerandi ávirkan sum úrslitið.

*Sosialurin ynskir kvinnunum og monnunum hjá VÍF tillukku við Føroyameistara-heitinum*